## Modric trívist í Tottenham

Italska felagið Juventus skal verða til reiðar við einum tilboði á 200 milliónir krónur fyri krotatiska Luka Modric, sum spælir fyri enska felagið Tottenham. Men Modric ætlar sær ikki at skifta felag. - Sjálvandi veit eingin, hvat framtíðin hevur at bjóða, men ætlanin hjá mær er at halda fram í Tottenham. Vit hava eitt gott lið, sum hoyrir heima í toppinum, sigur Modric við Daily Telegraph.



## Carlsberg leggur eftir Liverpool

Carlsberg hevur seinastu 16 árini verið høvuðsstuðul hjá Liverpool. Keld Strudahl, umboð frá fyritøkuni, staðfesti, at teir eru sera væl nøgdir við samstarvið, men Carlsberg sær fegin, at eigararnir Tom Hicks og George Gillett skjótt avgerða, hvat ætlanin er við felagnum. - Vit vilja vita, um teir ætla at selja ella varðveita felagið. Vit eru misnøgdir við, at teir lyftið um nýggjan leikvøll ikki verður hildið. Felagið er í vanda til teir taka eina avgerð, sigur Keld Strudahl við danska Tipsblaðið.

Tjaldur-VB 28-21 (14-11):

# VB fekk bank í Runavík

**Tjaldur hevur veruliga tikið dik á seg. Fríggjadagin sendu kvinnurnar í Runavík VB úr steypakappingini, og nú hótta tær eisini móti finaluplássinum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hjá VB var hetta vikuskiftið, har tær veruliga skuldu prógva, at tær eru til reiðar at seta seg aftur á føroysku hondbóltstrúnuna.

Men tað gekk so slettis ikki eftir vild.

Fríggjadagin fekk VB av at vita í steypakappingini, tá Tjaldur bukaði tær, og søgan endurtók seg leygardagin, tá somu lið dystaðust í landskappingini. Hetta í dystinum, har VB veruliga ætlaði at skræða seg púrasta leyst av Tjaldri og Neistanum, sum framvegis elta møguleikanum fyri einum finaluplássi.

### Endurtøka

Tjaldur hevði tó øðrvísi ætlanir við dystinum. Sigurin fríggjadagin gav teimum gott mót til uppgávuna, og tær prógvaðu eisini hesaferð, at orkan á liðnum nú er um at vera har, sum hon skal vera hjá einum veruligum avbjóðara.

Fyrsta góða korterið fylgdust liðini annars hampuliga væl, men seinastu løtuna undan steðginum kom spakuliga munur í.

Trý mál eru tó ikki tað stóra í hondbólti, men tá Tjaldur so økti upp í 20-13 beint eftir steðgin, vendist hetta ikki aftur. Sálarliga mundi hetta kennast sum eitt slag av deja-vu hjá VB, og kropsliga høvdu tær heldur ikki orkuna til at venda dystinum.

Ein roynd varð tó gjørd, og við seks málum á rað var VB veruliga ígongd við at skapa spenning aftur, men tá Tjaldur so aftur fekk svarað, skrædnaði fullkomuliga. Fimm tey seinastu málini í dystinum fullu øll til heimaliðið, sum soleiðis veruliga fekk prógvað fyri sær sjálvum, at tær eisini kunnu spæla við móti teimum stóru.



*Tvær ferðir á rað fekk VB bank í Runavík. Úrslitini benda á, at Tjaldur nú av álvara er til reiðar at takast við tey fremstu*

*Mynd: Johnny Lamhauge*

### VB og orkan

Fyribils er úrslitið nóg mikið til at staðfesta støðuna hjá Tjaldri, sum framhaldandi er avbjóðari til annað av finaluplássunum í kvinnukappingini.

Hinvegin er munurin upp til VB framvegis fýra stig, og tí verður tað framvegis sera trupult hjá Tjaldri at halda fast í tjóðrinum, sum tær hava sett á fremstu hestarnar.

VB eigur hinvegin framvegis til góðar at økja um orkuna á liðnum. Gurið Mortensen sat hesa ferð uttanfyri, men tað er merkisvert, hvussu avrikini hjá VB støðugt hava verið munandi betri í fyrra enn í seinna hálvleiki. Hetta sást sjónliga bæði fríggja- og leygardagin í Runavík, og tá tær vunnu á Stjørnuni í Klaksvík var sama søgan um at endurtaka seg.

**FAKTA um dystin**

**Tjaldur-VB 28-21 (14-11)**
10 min: 4-3
20 min: 8-7
40 min: 20-14
50 min: 23-20
**Málskjúttar**
**Tjaldur**: Alina Olaru 11(1), Adina Petrea 8, Jakoba Langgaard 4, Annika Thomsen 2, Elinbjørg Hammer 1
**VB**: Daiva Toumaite 9, Laila Jespersen 3, Sára Samuelsen 3, Rannvá Johannesen 2, Aukse Vysniaskaite 2, Bára Mortensen 1, Theresa Joensen 1
**Brotskøst**: Tjaldur 1
**Útvísingar**: Tjaldur 4, VB 3
**Dómarar**: Kartin Joensen & Kristian Joensen

Kyndil-KÍF 34-30 (15-12):

## Fyrsti Kyndils-sigur í vetur

**Tað eydnaðist Kyndils-monnum at basa kollfirðingum í gjár. Við sigrinum hevur grøna havnarliðið togað seg av botnsessinum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram til sunnudagin høvdu hvørki menn ella kvinnur hjá Kyndli vunnið ein tann einasta landskappingardyst.

Í seinastu royndini undan høgtíðini syrgdu grønu menninir tó fyri, at sigurin ikki gjørdist jólatrøll, tá teir á heimavølli bastu KÍF.

Talan var um botndyst millum tey bæði niðastu liðini í deildini, og fyri tað nógva var talan eisini um ein rættiliga javnan av slagnum.

Kyndil hevði tó støðugt mnin í dystinum, men ferð eftir ferð megnaðu gestirnir at vinna seg aftur upp á javnt. Men seinastu løtuna skrædnaði tó av álvara. KÍF fekk eina útvísing, og tá Kyndil so skoraði fimm mál á rað, kundi KÍF ikki svara aftur.

**Fakta um dystin**

**Kyndil-KÍF 34-30 (15-12)**
10 min: 6-3
20 min: 8-9
40 min: 20-18
50 min: 25-24
**Málskjúttar**
**Kyndil**: Høgni Klein 11(6), Bárður Johannesen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5(2), Tummas Pauli Hanusarson 4, Jónleif Sólsker 3, Janus Einar Sørensen 3, Andreas Sólsker 2
**KÍF**: Arnbjørn T. Hansen 9, Andrias Nielsen 6, Damir Oros 6, Rógvi Weihe 3, Niclas Reginsson 2, Ási Dam 2, Toney Weihe 1, Jákup Trygvason 1
**Brotskøst**: Kyndil 9, KÍF 1
**Útvísingar**: Kyndil 4, KÍF 5
**Diskvalifikatión**: KÍF 1 (beinleiðis reytt til beinkin)

# Nýtt fótbóltsfelag sær dagsins ljós í Eysturoy

**Enn hava tey ongan vøll og ongar spælarar, men tey hava stórar ambitiónir**

FÓTBÓLTSFELAG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eitt nýtt fótbóltsfelag hevur nú sæð dagsins ljós í Eysturoy.

Tað eru Jákup A Olsen á Toftum og aðrir, sum nú hava stovnað fótbóltsfelagið Ravnur FC.

Hóast felagið fær heimstað í Runavík, ætla tey ikki, at felagið skal knýtast at nøkrum ávísum plássi.

- Hetta er stutt og greitt eitt eysturoyarfelag, sigur Jákup Olsen avgjørdur.

Sjálvur mannar hann nevndina í nýstovnaða felagnum saman við Bent Djurhuus, Mortani Hansen og Odduri Rasmussen.

Og tá ið sagt verður, at felagið er nýstovnað, skal tað takast heilt bókstaviliga, tí enn hava tey ongar spælarar og enn minni nakran heimavøll.

Tó hava tey søkt Runavíkar Kommunu um loyvi at brúka vøll og skiftirúm á Skála ella í Runavík, men tað málið er ikki avgjørt enn.

Fótbóltssamband Føroya hevur heldur ikki góðkent nýggja felagið, men umsóknin er latin inn og Jákup Olsen vónar at formligu viðurskiftini og FSF góðkenning verða avgreitt í februar.

Men hóast felagið er í føðingini, er tað ikki bara navnið, sum er klárt enn. Tey hava eisini longu bæði búmerki og búnarnar klárt.

Jákup Olsen vil ikki avdúka smálutirnir í búmerkinum, men tað hevur okkurt við navnið at gera og búnarnir verða svartir.

### Kempa seg uppeftir

Av tí at tey hvørki hava heimavøll ella spælarar enn, hava tey heldur ikki meldað nakað lið til enn.

Men hetta arbeiða tey hart við og endamálið er at melda lið til í 3. deild næsta kappingarár, tí tað er á tí støðinum, at øll liðini skulu byrja.

Men hóast tey byrja bæði lágt og púrasta á berum, bagir ambitiónunum onki.

- Vit ætla at kempa okkum uppeftir og at enda í formuladeildini, sigur Jákup Olsen.

Hetta eina liðið, sum byrjar í 3. deild og sum tey vóna, berjir seg upp eftir í Formuladeildina, verður samstundis einasta liðið hjá felagnum í kappingini.

- Vit hava onga ungdómsdeild, men ætla at savna allar okkara kreftir um hetta eina liðið, sigur stigtakarin.

At talan er um eitt felag, sum eina og aleina hugsar um tað eina liðið, vónar hann, fer at eggja spælarum at leita sær til felagið.

*Men er tað ikki nóg mikið av fótbóltsfeløgum í Eysturoy og hví so eitt felag afturat?*

- Eg havi í veruleikanum onki gott svar til handan spurningin. Tað, sum vit miðja eftir, at savna allar okkara kreftir um eitt einstakt lið og tað halda vit ger tað meiri áhugavert enn at vera í feløgum, sum hava eina ørgrynnu av liðum, at hugsa um, sigur Jákup Olsen.